# 80.000 sóu Ronaldo í Madrid

Heili 80.000 garvillir áskoðarar vóru á Bernabeu, tá Cristiano Ronaldo í gjár læt seg í hvíta búnan hjá Real Madrid. Ronaldo var bara á vøllinum í hálvan tíma, men fagnaðurin mundi ongan enda tikið, tá hann fyrst jongleraði eitt sindur við bóltinum, áðrenn hann tók mikrofonina: - Hetta hevur verið mín dreymur, síðani eg var ein lítil drongur, segði Ronaldo við áskoðararnir.



# Hvidovre nær gjaldssteðgi

Seinasta kappingarár máttu bæði FC Amager og Køge geva skarvin yvir í dystinum móti fíggjarkreppuni. Nú bendir alt á, at Hvidovre noyðist sama veg. Sambært Ekstra-Bladet hevur spælarafundur verið í felagnum, tí felagið hevur heitt á hópin um at ganga við til ein lønarniðurskurð, sum skal vera við til at bjarga felagnum fíggjarliga.



# Fuglfirðingar fyri fyrstu ferð fremstar í Fuglafirði

**Kvinnurnar umborð á Erlu Kongsdóttir megnaðu leygardagin tað í kappróðri, sum kvinnurnar í Fuglafirði ongantíð áður hava megnað í heimasjógvi**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað var ikki hissini kapitul, sum leygardagin varð skrivaður í kappróðrarsøguni hjá fuglfirðingum.

Frá fyrsta taki var tað týðuligt, at tær á Erlu Kongsdóttir ætlaðu at seta eyka bluss undir stevnulagið í Fuglafirði. Erla Kongsdóttir og Frúgvin høvdu besta startin, og hesir báðir bátarnir lógu borð um borð allar túsund metrarnar.

Erla Kongsdóttir átti góðan endaspurt, og tá ið bátarnir fóru um málið, var munurin ein hálv bátslongd. Sigurin hjá Erlu Kongsdóttir ber við sær, at Erla Kongsdóttir nú er á odda í FM kappingini

Móttøkan var ófør, tá ið Erla Kongsdóttir kom aftur á dráttin, og tað var ikki so undarligt. Hetta var fyrstu ferð nakrantíð, at kvinnubáturin hjá fuglfirðingum vann á varmakeldu stevnu!

Fyrsta Erla Kongsdóttir varð smíðað veturin 1963/64. Niklas í Koltri, sáli, smíðaði, og tað kann gott vera, at hetta var seinasti báturin, sum hann smíðaði úti í Koltri.

Kvinnurnar í Fuglafirði vóru so mikið óføðar umborð á Erlu Kongsdóttir í 1964, at tær vunnu FM heitið, tá ið tað eftir ólavsøku varð kappast á Skálafjørðinum. Hetta árið vann Erla Kongsdóttir fleiri róðrar, men tað eydnaðist teimum ikki at vinna í Fuglafirði. Á varmakeldu í 1964 var tað Ternan av Toftum, sum vann kappingina millum 5-mannafør við kvinnum.

Báturin, sum tær í Fuglafirði nú gera seg galdandi í, varð upprunaliga smíðaður sum Sílið hjá Havnar Róðrarfelag. Hetta var í 2002. Í 2007 varð báturin keyptur til Fuglafirðar, og í ár hevur gingið so mikið væl, at Erla Kongsdóttir nú er á odda í FM kappingini.

Tað hevur annars verið langt millum sigrarnar hjá fuglfirðingum í kappróðri. Einasti sigurin á varmakeldu frammanundan tí leygardagin varð vunnin 5. juli í 1997. Tá var tað 8-mannafarið Gullbrandur, sum vann. Hann var tá mannaður við monnum úr Funningsfirði og bygdunum har á leið.

Í 1964 fingu fuglfirðingar nýtt 10-mannafar. Besta árið við tí bátinum var í 1968, tá ið Fuglfirðingur vann FM.

Í nýggjari tíð hevur kvinnumanningin á Erlu Kongsdóttir bara vunnið eina ferð, áðrenn sigrarnar á norðoyastevnu, fjarðastevnu og ná á varmakeldu í ár. Tá var á fjarðastevnu í 1991, sum var í Kollafirði, at Erla Kongsdóttir, sum annars ikki stóð seg nakað serliga væl, vann.

Einki er at ivast í, at tað hevur havt árin í Fuglafirði, at kappróðurin nú hevur fingið betri umstøður. Kommunan eigur bygningin, har kappróðrarfelagið húsast. Men tað eru eldsálir í felagnum, sum hava fingið fígging til vega og hava innrættað hølini, so tey nú hava góðar umstøður til felagsarbeiði og venjingar.

# Tjaldrið spennir sínar veingir

**Hesa ferð vunnu dreingirnir av Skálafjørðinum eitt vet tryggari sigur, enn teir gjørdu á Trongisvágsfirði**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað gekk, sum tað plagar at gera, tá ið 5-mannafórini við dreingjum kappaðust á varmakeldu. Í undanfarnu kappingunum hevur Tjaldrið vunnið. Á jóansøku var sigurin tepr ari, enn hann hevði verið undanfarnu ferðirnar, og tí kendist tað ivaleyst serliga spennandi undan kappróðrinum í Fuglafirði.

Báðir bátarnir hjá Argja Róðrarfelag – Blikur og Teistin – royndu at bjóða av, og tað var leingi heilt tætt. Allir hinir duttu afturav, og í endaspurtinum vóru tað Tjaldrið og Blikur, sum kappaðust um fremsta plássið.

Teir á Tjaldrinum vóru teir drúgvaru. Tá ið bátarnir fóru um málið, var Tjaldrið eina hálva bátslongd frammanfyri Blik. Teistin var leingi væl við, men í endaspurtinum eydnaðist tað Royndini Fríðu at taka Teistan og harvið at tryggja sær bronsuplássið.

Nú skal tað vilja meiri enn illa til hjá dreingjunum í Kappróðrarfelagnum NSÍ, um tað ikki skal eydnast teimum at vinna FM heitið. Undan vestanstevnu og ólavsøku hevur Tjaldrið níggju stig at geva av.

Tó er einki at ivast í, at talan framvegis verður um stóra og tætta kapping. Tjaldurs dreingirnir vilja fegnir vila FM við fullari úrtøku, og argjadreingir vilja fegnir vinna róðrarnar, sum eftir eru – ikki minst á ólavsøku.

**Fyri fyrstu ferð yvirhøvur vann bátur úr Fuglafirði FM-róður á heimasjógvi**

**FM-kapPróður**

| | 5-mannafør, dreingir | Stig íalt | Varmakelda |
|---|---|---|---|
| 1 | Tjaldrið | 35 | 7 |
| 2 | Blikur | 26 | 6 |
| 3 | Teistin | 18 | 4 |
| 4 | Junkarin | 18 | 0 |
| 5 | Royndin Fríða | 16 | 5 |
| 7 | Báran | 14 | 3 |
| 8 | Kollur | 8 | 2 |
| 9 | Havfrúgvin | 3 | 0 |
| 10 | Sílið | 1 | 1 |
| 11 | Jallurin | 1 | 0 |
| | **6-mannafør, kvinnur** | | |
| 1 | Gongurólvur | 35 | 7 |
| 2 | Páll Fangi | 29 | 6 |
| 3 | Sølmundur | 25 | 5 |
| 4 | Jarnbardur | 20 | 4 |
| 5 | Hvessingur | 16 | 3 |
| 6 | Romvlvs | 10 | 2 |
| | **5-mannafør, gentur** | | |
| 1 | Firvaldur | 31 | 7 |
| 2 | Jallurin | 31 | 6 |
| 3 | Sílið | 22 | 5 |
| 4 | Hvassi | 17 | 4 |
| 5 | Havfrúgvin | 14 | 3 |
| 6 | Falkur | 10 | 1 |
| 7 | Báran | 7 | 0 |
| 8 | Junkarin | 3 | 2 |
| 9 | Kollur | 3 | 0 |
| 10 | Katla | 1 | 0 |
| | **5-mannafør, kvinnur** | | |
| 1 | Erla Kongsdóttir | 33 | 7 |
| 2 | Frúgvin | 32 | 6 |
| 3 | Hvassi | 23 | 4 |
| 4 | Ritan | 22 | 5 |
| 5 | Blikur | 15 | 3 |
| | **6-mannafør, menn** | | |
| 1 | Riddarin | 33 | 6 |
| 2 | Tvørabáturin | 32 | 7 |
| 3 | Smyril | 20 | 2 |
| 4 | Sundabáturin | 19 | 5 |
| 5 | Gongurólvur | 16 | 4 |
| 6 | Skúgvur | 11 | 1 |
| 7 | Rádni | 8 | 3 |
| 8 | Jarnbardur | 1 | 0 |
| | **8-mannafør** | | |
| 1 | Argjabáturin | 35 | 7 |
| 2 | Ørvur | 26 | 5 |
| 3 | Árnfirðingur | 24 | 6 |
| 4 | Knørrur | 20 | 3 |
| | **10-mannafør** | | |
| 1 | Klaksvíkingur | 33 | 7 |
| 2 | Eysturoyingur | 32 | 6 |
| 3 | Havnarbáturin | 25 | 5 |



Vinnur Tjaldrið á vestanstevnu, kunnu teir rópa seg føroyameistarar longu áðrenn ólavsøkuróðurin